# Hetlendingar fegnast um føroyska kaðalin

**Hetlendingar vænta sær nógv burtur úr kaðalinum SHEFA-2, sum Føroya Tele fer at leggja**

SAMSKIFTI
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Politikarar í Hetlandi eru ovurfegnir um avgerðina hjá Føroya Tele at leggja ein nýggjan samskiftiskaðal úr Føroyum til Hetlands, Orkneyoyggjarnar og Skotlands. Travis Scott, sum umboðar Hetland í skotska tinginum, sigur við Shetland News, at hann hevur longu biðið bretska telefelagið British Telecom bera so í bandi, at hetlendingar fáa gagn av føroyska kaðalinum.

– Nú ræður um hjá BT at gera gagn av hesum møguleikanum, so teir kunnu veita hetlendsku brúkarunum betri tænastu, sigur tingmaðurin við blaðið.

British Telecom hevur arbeitt við at útvega hetlendingum skjótari samskifti, men eftir teirri ætlanini skuldu hetlendingar ikki fáa hendan møguleikan fyrr enn í 2011. Men við kaðalinum hjá Føroya Tele kunnu hetlendingar fáa skjótari samskifti nógv fyrr enn so, og tað eiga teir at fáa, sigur Travis Scott við Shetland News.

Sandy Cluness, ráðsformaður, sigur við blaðið, at tað nýggja sambandið er eitt stórt framstig fyri hetlendska vinnulívið og serstakliga tey, sum hava slíkt samband fyri neyðini til dagliga virksemi sítt.

Í Hetlandi fer SHEFA-2 upp á land nærhendis bygdini Maywick, og síðani verður hann lagdur eftir landi til Sandwick, tá hann fer aftur í havið og víðari til Orkneyoyggjarnar og Skotlands.



*Tróndur Djurhuus, stjóri í FT International, fylgdi væl við tí sum hetlendsku politikararnir søgdu umvegis web-sjónvarpið úr Hetlandi, tá tíðindafundurin var í Klingruni mánadagin*


